

*– Vit hava góðar vónir um, at fíggjarliga rásarúmið hjá Eiðis kommunu skjótt verður nakað størri, sigur Rólant Poulsen, borgarstjóri í Eiðis kommunu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Góðir karmar um Eiðis kommunu

**– Við hækkaða skattaprosentinum á nýggjárinum í fjør eru skattainntøkurnar í ár øktar nakað. Í løtuni er skuldin hjá kommununi einar tvær miljónir krónur omanfyri eina álíkning, men vit vóna, at hesi viðurskifti koma upp á pláss aftur, tá komandi ár er hálvrunnið, sigur borgarstjórin í Eiðis kommunu, Rólant Poulsen, sum harmast um, at útbyggingar, ið kommunan er partur av, eru vorðnar nógv dýrari enn ætlað**

Vilmund Jacobsen

Borgarstjórin í Eiðis kommunu, Rólant Poulsen, dugir at taka til, og tá vit hittu hann í telefonini seint týskvøldið, helt hann fyri, at størstu arbeiðsplássini á Eiði eru at ansa børnum og gomlum.

– Tíverri, legði hann aftrat.

Men borgarstjórin kann samstundis fegnast um, at karmarnir um vinnulív í kommununi eru góðir, eins og umstøðurnar hjá børnum við nýggjum barnagarði, eldrasambýli og góðum umstøðum við skúla og ítróttarhøll eru teir bestu, ið hugsast kunnu.

### Lítið fiskaarbeiði

Rólant Poulsen harmast um, at meiri virksemi ikki er á Norðís Seafood, sum gjøgnum mong ár hevur verið tað stóra arbeiðsplássið í bygdini.

– Her hevur rættiliga lítið arbeiði verið í longri tíð, men vit kunnu bara vóna, at lív fer at koma í aftur.

Borgarstjóranum kunnugt eru arbeiðsfólkini á Norðís Seafood framvegis í starvi og so leingi, tey ikki eru uppsøgd, er vón um, at meiri virksemi aftur verður á virkinum.

– Vit hava eisini Bátafisk, har ungir menn arbeiða akkord. Tað er serliga útróðrarfiskur, sum verður keyptur, men tá lítil útróðrarfiskur er, verður viðhvørt annar fiskur keyptur á uppboðssølu.

Sum skilst á borgarstjóranum, verður útróðrarfiskur pakkaður á Bátafisk, sum síðan verður útfluttur feskur.

– Bátafisk virkar soleiðis sum ein ventilur, ið kann verða við til at uppihalda einum marknaðarprísi á fiski í Føroyum.

### Annað virksemi

Rólant Poulsen sigur, at á havnalagnum er eisini virkið, sum tekur ímóti fráfalli hjá laksakryvjivirkinum.

– Hetta er eitt virkið, sum laksaframleiðarar eiga, og sum virkar fráfall og deyðan alifisk til lýsi.

Hann sigur, at í minsta lagi einaferð um mánaðin kemur farmaskip eftir lýsi, sum verður pumpað av virkinum og í tangar umborð á skipinum.

– Vanliga eru tað norsk skip, sum koma eftir lýsinum, men onkuntíð hevur onkur russari eisini verið á Eiði. Hetta eru skip, sum liggja um einar 100 metrar og taka eini 1000-1200 tons, leggur hann aftrat.

Rólant sigur, at slík afturvendandi vitjan gevur kommununi nakað av inntøkum í vøru- og havnagjaldi.

Á havnalagnum á Eiði er eisini virkið, ið eitt nú virkar úr skræðu, sum verður brúkt í heilivágsídnaðinum.

– Vit vita ikki nógv um hetta virksemi, men sum vit hava skilt, er her talan um dýra framleiðslu, sigur borgarstjórin.

Rólant Poulsen sigur, at eitt annað virkið á Eiði, er virkið Tonito sum ger brævbjálvar, og her eru eini 3-4 fólk til arbeiðis.

– Vit hava eisini nakrar handverksmeistarar í kommununi, sum arbeiða her í økinum, tá okkurt er at gera, men sum annars arbeiða aðrastaðni kring landið, tá virksemi í økinum er minni.

Borgarstjórin heldur ikki, at talan er um nakað serligt arbeiðsloysi í Eiðis kommunu.

### Øktar inntøkur

– Við hækkaða skattaprosentinum á nýggjárinum í fjør eru skattainntøkurnar í ár øktar nakað. Í løtuni er skuldin hjá kommununi einar tvær miljónir krónur omanfyri eina álíkning, men vit vóna, at hesi viðurskifti koma upp á pláss aftur, tá komandi ár er hálvrunnið.

Rólant Poulsen vísir á, at ein álíkning liggur um slakar 19 miljónir krónur, og skuldin í dag liggur beint undir 21 miljónir krónur, harav langfreistaða skuldin liggur um 12 miljónir krónur.

Borgarstjórin sigur, at tá Fe-